fylgiskjal 9

UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

J. nr. 18/00095
11. juli 2018

# Hoyringsnotat

**Uppskot til løgtingslóg um at einskilja P/f Postverk Føroya**

Hoyringarsvar eru komin frá:
1. **Føroya Arbeiðsgevarafelag**
2. ~~**Starvsmannafelagnum**~~
3. **Posteftirlitinum**
4. **Kommunufelagnum**
5. **Sofus Clemmensen**
6. **Álvur Danielsen**

**Gjøgnumgongd av hoyringarsvarum og viðmerkingar til hoyringarsvarini**

- Niðanfyri eru endurgevingar av høvuðstættunum í viðmerkingunum í hoyringarsvarunum til uppskotið
- Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum til hoyringarsvarini

**Ad. 1. Føroya Arbeiðsgevarafelag (fylgiskjal 2)**
Felagið tekur undir við, at P/F Postverk Føroya verður einskilt. Felagið sær fram til eina væl fyrireikaða og gjøgnumskygda sølu.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at tað kundi verið gjørt greiðari í uppskotinum, at skyldan hjá keyparanum at reka postflutning sambært konsessión bert er galdandi í 10 ár, og at keyparin eftir hetta er leysur av øllum skyldum hesum viðvíkjandi. Felagið mælir til, at eitt møguligt politiskt ynski um skyldu til ávíst postvirksemi, tá tey 10 árini eru runnin, verður boðið út, so allir aktørar á post- og flutningsmarknaðinum eru undir somu treytum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag undrast á, at tað er neyðugt at skriva í frágreiðingina, at "Starvsfólk varðveita síni rættindi sambært verandi sáttmálum. Tað verið seg við Starvsmannafelagið, sum tænastumenn ella einstaklingasáttmálar við Postverk Føroya." Løgfrøðiliga eindin er óbroytt aftaná eina sølu, men hetta merkir ikki, at nýggi eigarin ikki kann gera broytingar, men at hesar skulu verða gjørdar sambært verandi sáttmálum við starvsfólkini.

**Viðmerkingar:**
Uttanríkis- og vinnumálaráðið skal vísa á, at tað í uppskotinum verður lagt upp til, at konsessiónin er galdandi í eitt 10 ára tíðarskeið. Tá 10 ára konsessiónstíðarskeiðið er runnið kann væntast, at uppgávan verður boðin út soleiðis, at fleiri hava møguleika til at bjóða uppá uppgávuna.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið er samt við Føroya Arbeiðsgevarafelagi í, at løgfrøðiliga eindin er óbroytt aftaná eina sølu, men at hetta ikki merkir, at nýggi eigarin ikki kann gera broytingar, men

TINGANES • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 35 60 60 • TELEFAX 35 60 65 • E-MAIL: UVMR@UVMR.FO

at hesar skulu verða gjørdar sambært verandi sáttmálum við starvsfólkini. Nágreiningar eru gjørdar í viðmerkingunum til uppskotið soleiðis, at ivi ikki er um hesi viðurskifti.

**Ad. 2. Starvsmannafelagið (fylgiskjal 3 og 8)**
Starvsmannafelagið hevur sent inn hoyringsskriv, dagfest 24. mai 2018 og hevur tann 6. juli 2018 sent inn eitt ískoyti til hoyringsskrivið.

Starvsmannafelagið heldur, at politiska skipanin eigur ikki at einskilja almennar tænastur, og metir felagið ikki, at tænasturnar verða betri aftaná eina einskiljing.

Starvsmannafelagið vísir á, at so leingi landið hevur eina veitingarskyldu viðvíkjandi posttænastum til allar borgarar í landinum eigur Posta at verða varðveitt sum almennur stovnur ella alment partafelag.

Starvsmannafelagið saknar í uppskotinum eina greining av starvsfólkaviðurskiftunum. Felagið heldur at landið, sum eigari av postverkinum síðani 1976 eigur at tryggja, at viðurskiftini hjá starvsfólkunum ikki fara at versna eftir, at partabrøvini eru farin á privatar hendur – ikki bert í sambandi við søluna, men eisini í tíðini aftaná. Tí mælir felagið til, at tað verður ásett beinleiðis í lógini um at einskilja P/F Postverk Føroya og í sølutilgongdini, at:

- Komandi keyparar av partabrøvunum í P/F Postverki Føroya binda seg til at tryggja, at sáttmálaviðurskiftini framhaldandi eru skipaði eftir kollektivum sáttmála við tað fakfelag, sum starvsfólkini taka undir við, og at
- Komandi keypari/keyparar binda seg til, at minsturættindi viðvíkjandi løn- og arbeiðskorum ikki verða skerd, tá ið nýggjur kollektivur sáttmáli skal gerast.

Starvsmannafelagið heitir á landsstýrið um at áseta, at í minsta lagi fyrisitingarlógin verður galdandi í starvsfólkamálum í teimum almennu partafeløgunum. Hetta so, at starvsfólkini í almennu fyritøkunum vera javnsett við starvsfelagar sínar hjá landi og kommunum.

**Viðmerkingar:**
Uttanríkis- og vinnumálaráðið skal vísa á, at almennu áhugamálini viðvíkjandi postflutningi eru skipað í løgtingslóg um postvirksemi. Tá reglur eru ásettar í løgtingslóg um postvirksemi viðvíkjandi veitingarskyldu, konsessión, eftirliti osv. verður ikki mett, at tað er neyðugt, at landið er eigari av fyritøkuni, sum rekur postvirksemi í Føroyum, fyri at tænastan skal vera góð og vælvirkandi. Víst verður til almennu viðmerkingarnar í uppskotinum, har grundgivið verður fyri, hví tíðin er komin, at landið eigur at selja partabrøvini í felagnum.

Viðvíkjandi starvsfólkaviðurskiftunum skal Uttanríkis- og vinnumálaráðið vísa á, at ein søla av partabrøvunum í felagnum í útgangsstøði ikki hevur ávirkan á starvsviðurskiftini hjá starvsfólkunum. Í sambandi við søluna varðveita starvsfólkini tey rættindi sambært lóggávu, kollektivum og einstaklinga sáttmálum, sum tey høvdu áðrenn søluna. Hetta forðar tó ikki fyri, at ein nýggjur eigarin kann fara undir at gera broytingar í fyritøkuni aftaná yvirtøkuna, men tá skulu tær reglur haldast, sum sambært lóg ella sáttmála eru galdandi í sambandi við fremjan av broytingum. Avgerð er tikin um ikki at fylgja tilmæli Starvsmannafelagsins um við lóg at áleggja komandi keypara at vera fevndur av ávísum kollektivum sáttmála og at binda seg til, at rættindi ikki verða skerd, tá nýggjur kollektivur sáttmáli skal gerast. Mett verður, at slíkar bindingar vildu ført til, at áhugin fyri at keypa fyritøkuna bleiv minni, og við slíkum ásetingum hevði landsstýrið ella Løgtingið lagt seg út í viðurskifti, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum við samráðingum eiga at loysa.

Áheitanin frá Starvsmannafelagnum um at áseta, at fyrisitingarlógin skal galda í partafeløgunum hjá landinum er ikki viðkomandi fyri lógaruppskotið um P/F Postverk Føroya, tí eftir søluna er felagið ikki longur eitt partafelag hjá landinum.

**Ad. 3. Posteftirlitið (fylgiskjal 4)**
Posteftirlitið vísir á, at tað vanliga er gagnligt fyri eina vinnu, at ein konsessión er galdandi yvir longri tíðarskeið, tí tá eru karmarnir meira støðugir. Hinvegin er postvirksemi ein vinna við ivasemi um framtíðina og mest sannlíkt við minkandi virksemi. Posteftirlitið vísir á, at ávísar treytir í konsessiónini møguliga eiga at tillagast, og mælt verður til, at innihaldi í konsessiónini verður viðgjørt neyvari í sambandi við sølufyrireikingarnar, og er Posteftirlitið til taks í tí arbeiðinum.

**Viðmerkingar:**
Uttanríkis- og vinnumálaráðið tekur undir við tilmæli Posteftirlitsins um at konsessiónstreytirnar verða viðgjørdar og møguligar tillagingar verða gjørdar í sambandi við sølufyrireikingarnar.

**Ad. 4. Føroya Kommunufelag (fylgiskjal 5)**
Kommunufelagið mælir til, at landið í søluni tryggjar, at postskyldurnar framhaldandi verða røktar væl og virðiliga mótvegis øllum økjum í Føroyum.

**Viðmerkingar:**
Í sambandi við søluna av P/F Postverk Føroya verður ásett, sum ein treyt til keyparan, at hann í eitt 10 ára tíðaskeið hevur skyldu til at røkja skyldirnar hjá landinum, sum P/F Postverk Føroya í dag røkir sambært konsessiónini og postvirksemislóggávuni.

**Ad. 6. Sofus Clemmensen (fylgiskjal 6)**
Í viðmerkingum sínum vísir Sofus Clemmensen á, at eitt nýhugsað føroyskt BtC (Business to Consumer) flutningskervi til nethandil eigur at verða ment. Sjálvur hevur hann áður skotið upp, at eitt slíkt nýhugsað føroyskt flutningskervi verður skipað, sum bæði vinna og borgari hava lætta atgongd til. Hetta kundi loyst strukturellu handilsforðingarnar millum útheimin og Føroyar, tí tað hevði avmarkað flutnings- og tollavgreiðslukostnaðin fyri BtC flutning og økt um MvG inntøkur landskassans umframt, at føroysk handilsvinna fekk møguleika at menna seg í tráð við menningina innan altjóða nethandil.
Nethandil er tað mest innlýsandi vakstrarøkið innan postalu vinnuna, og tí sæst eisini, at postfeløg kring allan heim vaksa um sítt virksemi innan nethandil. Strukturella handilsforðingin millum útheimin og Føroyar ger tó, at Posta ikki fær ment sítt virksemi á sama hátt innan hetta økið.
Um landið sær tað sum sína uppgávu, at viðvirka til at skapa nøktandi tænastustøði innan nethandil, eigur landið at taka spurningurin um strukturellu handilsforðingina upp til viðgerðar og lýsa málið nágreiniliga, innan partabrøvini í P/F Postverk Føroya verða seld.

**Viðmerkingar:**
Uttanríkis- og vinnumálaráðið tekur undir við viðmerkingunum hjá Sofusi Clemmensen um, at nethandil er eitt eyðsæð vakstrarøki innan postalu vinnuna. Somuleiðis eru ávísar strukturellar forðingar fyri, at nethandil millum Føroyar og umheimin kann mennast til fulnar. Uttanríkis- og vinnumálaráðið skal viðmerkja, at slíkar avbjóðingar í mun til nethandil finnast í flest øllum londum, og ymsar loysnir og skipanir verða nýttar at betra um flutningskervið í so máta. Avbjóðingin er í stóran mun eisini at tryggja rættvísa kapping millum heimliga vinnu og

útlendskar framleiðarar í mun til prís og avgjøld, og at tryggja nøktandi vernd til brúkaran. Tøkniliga menningin innan skráseting og sporing av nethandli samrunnið við størri denti á sjálvgreiðslu av tolli og gjøldum kann sannlíkt vera við til at loysa nakrar av hesum strukturellu avbjóðingum, samstundis sum fyrilit verður fyri rættvísari kapping og brúkaravernd.

**Ad. 7. Álvur Danielsen (fylgiskjal 7)**
Álvur Danielsen vísir á, at tað í tí ávegis frágreiðing, sum fyriliggur, verður gjørt nakað burturúr teimum ognum, sum eru tøkar hjá P/F Postverk Føroya. Hann metir, at har eru aðrar virðismiklar ognir, sum ikki verða nevndar, herundir m.a. lutir frá danska postverkinum, ið eftir ætlan skuldu nýtast til eitt komandi føroyskt postsavn, frímerkir, heftir, upprunatekningar frá listafólki o.a. Álvur Danielsen vísir á, at hesir lutir eru fólksins ogn, og eiga teir at verða latnir Føroya Fornminnissavni.
Eisini eiga gamlir uniformmar, postkassar, myndasavn v.m. somuleiðis at falla í varðveitsluna hjá Føroya Fornminnissavni sum ogn hjá fólkinum.

**Viðmerkingar:**
Uttanríkis- og vinnumálaráðið skal vísa á, at spurningurin um m.a. hesar ognir í felagnum verður tikin upp, áðrenn felagið verður selt. Hetta uppskotið snýr seg um at fáa heimild til at selja partabrøvini í felagnum. Tá henda heimild er fingin til vega verður farið undir eina sølutilgond, og tá verður høvi til at viðgera og taka avgerð um, hvat eigur at verða gjørt við teir lutir, sum her er víst á hava stórt virði og eiga at verða latnir Føroya Fornminnissavni. Landsstýrið vil í hesum sambandi tryggja at ognir og lutir av søguligum virði verða latin landinum.